# Jólasøla í Køkshúsunum

JÓL

Á Toftum liggur heimrustin millum áirnar mitt í gomlu bygdini.

Og mitt í heimrustini liggja eini gomul hús, kallað í Køk.

Húsini eru svarttjørað, grundin hvítkálkað, og takskeggið hongur úr flagtekjuni. Ein røtt ímynd av einum gomlum føroyskum húsum.

Í hesum hugnaligu søguligu húsunum, sum Bygdasavnið í Nes kommunu eigur, verður jólasøla hildin í dag, fríggjadagin og í morgin, leygardagin.

Tað eru handasnild fólk, sum hava gjørt lutir til jólasøluna.

Har eru prýðislutir og brúkslutir, jólaprýði, gávulutir, góðar jólagávur, - alt góðir handverkslutir gjørdir úr viði, leiri, klæði, ull, filt – ja, alt prýðiligt til jóla.

Høvi er eisini at fáa sær ein kaffimunn við góðum heimabakaðum afturvið.

Øll eru vælkomin á jólasølu í Køkshúsunum á Toftum, siga fyrireikararnir og Bygdarsavni.

Opið er fríggjadagin millum kl. 16 og 20 og leygardagin millum kl. 10 og 18.



# Sjónleikur uttan handrit

**Mánakvøldið 23. januar 2006 skipar MáF fyri skeiði í improvisatión í Mentanarhúsinum í Fuglafirði**

SKEIÐ



*Improvisatiónsteatur er sjónleikur uttan handrit – ein stuttlig avbjóðing fyri bæði áskoðara og leikara*

Improvisatiónsteatur er stuttligur sjónleikur, har hvør sýning er bæði frumsýning og endasýning í senn. Tað er teatur uttan leikrit, improviserað í løtuni, sum ein stór avbjóðing bæði fyri sjónleikara og áskoðara.

Improvisatiónsteatrið, eins og teatrið yvirhøvur, hevur sín uppruna í teimum fornu mytunum, gudasøgunum. Burtur úr teimum vóru tær fyrstu teatursøgurnar skaptar.

Ikki fyrr enn við comedia del ‘arte fingu vit ein teaturform, sum rúmkaði um møguleikarnar fyri nýggjari inspiratión. Haðani ganga leiðirnar ymsar vegir líka fram til okkara dagar.

Improvisatiónsteatur, tað sokallaða impro-teatrið, tók seg upp í 1950-árunum við onglendinginum Keith Johnstone á odda, sum kom frá The Royal Court Theatre. Hann gjørdi sær leikbólkin Theatre Machine til endamálið og ferðaðist við honum í 1960-árunum. Seinni gjørdist hann professari í drama í Calgary í Kanada.

Lærari á skeiðnum hjá MáF er danin Bo Krüger, sum er royndur improleikari og undirvísari. Bo er kendur fyri sín stuttliga og energiska hátt at læra frá sær. Hann hevur spælt impro-teatur í yvir 10 ár, og hevur m.a. verið við í donsku bólkunum “Lama” og “De gales division”. Hann hevur spælt á “Comedy Zoo” og í Musikkhúsinum í Århus. Hartil hevur hann eisini verið á skeiði hjá kendum leikarum sum Keith Johnstone og Charna Halpern.

Skeiðið verður hildið mánakvøldið 23. januar frá klokkan 17 til 22 og er ætlað øllum sjónleikaráhugaðum føroyingum yvir 16 ár.

Tú kanst tekna teg hjá MáF á maf@maf.fo“ maf@maf.fo ella 315624 í seinasta lagi mánadagin 19. desember 2005 kl. 15.00. Avmarkað luttakaratal.

**ave**

# Livandi tónleikur í Leikalund

Nú tað stundar til jóla, fer Leikalund at royna at fáa fólk í jólahýr við at hava ymisk tiltøk í hugnaliga umhvørvinum úti í Klaksvík. Vit byrja komandi fríggjakvøld, 9. desembur, tá livandi tónleikur, við Hans Hjalta Skaale, Karl Martin Samuelsen og Eyðun Nolsøe, verður at hoyra. Tiltakið byrjar kl 21.00 og heldur áfram til kl 23.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Nærri verður lýst við komandi tiltøkum.

# Ókeypis øl í Eclipse

NÁTTARLÍV

Dansistaðið Eclipse í Havn er farin undir eitt nýtt og óvanligt tiltak, ið teir siga at verða komið fyri at verða. Hvørt fríggjakvøld bjóðar dansistaðið ókeypis Veðrøl frá Føroya Bjór frá kl 23 til 02.

Ja, man kann drekka so nógv, man orkar, sigur Havgrímur Johannesen, sum rekur staðið.

Hann sigur, at hetta nýggja tilboðið verður fyrstu ferð í kvøld, tá Rúni Kjær, DJ, stendur fyri tí nýggjast nýggja av tónleiki, og leygarkvøldið tá tað verður diskotek við DJ Eddi.


